## Landsliðshagtøl fyri hondbóltin



Niels Nattestad hevur nú arbeitt seg gjøgnum teir hondbóltslandsdystir, sum føroyska mannslandsliðið hevur spælt, síðani fyrsti dysturin varð spældur í 1964. Tilfarið er nú lagt inn á heimasíðuna hjá HSF. Á yvirlitinum sæst millum annað, at Hanus Joensen er tann, sum bæði hevur spælt flestar dystir og skotið flest mál fyri Føroyar. Av núverandi spælarunum er Hans Áki Dal-Christiansen tann, sum hevur spælt flestar dystir, meðan Heini Hanusarson er spælarin, ið er nærmast við at taka málmetið hjá pápanum.

## Bogi og Jónas við í javnleiki

Andreas Lava Olsen hevur fingið ein minni skaða, og hevur tískil ikki tikið lut í teimum báðu síðstu venjingardystunum hjá Frem. Tað hava teir báðir Bogi Løkin og Jónas Þór Næs hinvegin. Týsdagin spældi Bogi Løkin allan fyrra hálvleik, tá Frem vann 3-1 á Avarta, sum spælir eina deild lægri enn Frem. Sambært heimasíðuni hjá Frem var Bogi Løkin einasti føroyingurin á liðnum henda dystin. Í gjár var umframt Boga Løkin eisini Jónas Þór Næs við á liðnum. Teir báðir fingu hvør sín hálvleik – Bogi spældi fyrra á miðvøllinum, meðan Jónas spældi seinna á høgra bakki. Hesin dysturin var í móti næstbesta liðnum hjá FC Nordsjælland og endaði hann við javnleiki 2-2. Hvørgin av føroyingunum kom á máltalvuna, men Jónas Þór Næs fekk eitt gult kort móti dystarenda. Næsti venjingardysturin hjá Frem verður leygardagin, tá teir spæla í móti næstbesta liðnum hjá Brøndby.

# Elligamal jødi fekk ítróttarmet aftur

**Ì 1936 fekk Gretel Bergmann sítt met strikað, tí hon var jødi. Men nú hevur frælsa ítróttarsambandið í Týsklandi rættað uppá órættin, og hevur syrgt fyri, at avrikini hjá Gretel Bergmann koma til heiðurs og æru aftur**




Heri Simonsen



**Tað tók sína tíð, men nú hevur 95 ára gamla Gretel Bergmann fingið staðfest síni ítróttarligu avrik**

Ofta kunnu ganga mong ár, áðrenn ein órættur verður rættaður upp aftur. Tað má tann nú 95 ára gamla Gretel Bergmann, sum er týskur jødi av sonnum sanna. 30. juni í 1936 setti tann tá 22 ára gamla, Gretel Bergmann týskt met í hæddarlopi, tá hon leyp 160 sentimetrar. Men stutt aftaná, tá nazistarnir funnu út av, at Gretel Bergmann var jødi bleiv hetta týska metið strikað, sum var ein ræðulig eyðmýking fyri Gretel Bergmann.

Tað neit eisini Gretel Bergmann dygt, at hon heldur ikki slapp at taka lut á olympisku leikunum í Berlin í 1936. – Eg var rasandi, tá eg fekk at vita, at eg ikki slapp við til olympisku leikirnar. Tá fór eg heim og legði ætlanir um hvussu eg kundi flýggja til USA.




### Viðurkend aftur

Við amerikanska blaðið, Daily News, sigur Margaret Bergmann Lambert, sum hennara fulla navn er:

– Eg var slettis ikki til, tí eg var jødi. Sum allir aðrir týskir jødar, so gjørdist Gretel Bergmann eisini statsleysur borgari.

– Eg haldi ikki, at míni avrik vóru framúrskarandi, eg var bara ein javnt góður atletur. Eg vandi ikki eingong so nógv, sum eg burdi. Frælsa ítróttarsambandið í Týsklandi hevur nú loksins viðurkent metið hjá Gretel Bergmann, og tað kemur nú at standa í teimum søguligu yvirlitunum hjá tí frælsa ítróttarsambandinum.

Týska ítróttarsambandið leggur herðslu á, at henda avgerðin kann á ongan hátt rættvísgera tað, sum er hent. Avgerðin er meira ein symbolsk staðfesting.

### Maður í kvinnu stað

Tað sum ger avgerðina hjá nazistunum enn verri er, at Dora Ratjen sum bleiv tikin út til týska liðið ístaðin fyri Gretel Bergmann vísti seg at verða ein maður. Tað bleiv tó ikki avdúkað fyrr enn seinni, at Dora Ratjen í veruleikanum var ein maður, sum æt Horst Ratjen. Horst Ratjen var avdúkaður av einum lækna í 1938, og tá bleiv hann/hon koyrd/ur av liðnum.

Tann 95 ára gamla Gretel Bergmann býr í dag í USA. Í 1937 eydnaðist tað henni at flýggja úr Týsklandi til New York, har hon var væl móttikin. Tað eydnaðist henni at gerast amerikanskur meistari í longdarlopi, bæði í 1937 og í 1938. Sum ung kvinna svór hon, at hon skuldi ongantíð vitja Týskland aftur, men hon kom á aðrar tankar.

– Ein kann ikki lasta teimum ungu týskarunum fyri tað, sum abbarnir hjá teimum gjørdu, sigur Gretel Bergmann við blaðið, New York Daily News. Gretel Bergmann hevur verið gift við tí 99 ára gamla Bruno Lambert í samfull 71 ár. Gretel Bergmann viðgongur tó, at tað hevur mangan verið ringt hjá henni at hyggja eftir olympisku leikunum í sjónvarpinum.

– Fyri at siga tað, sum tað er, so plagdi eg at sita og banna niður og norður, meðan leikirnir vóru, men eisini á tí økinum havi eg sissað meg rættiliga nógv, og eg dugi nu betur at njóta teir olympisku leikirnar, sigur Gretel Bergmann við Daily News. Leingi er tað, ið væl skal vera.

# Grenj um niðurflyting

**Veruleikin um at eitt lið kann flyta niður, hevur gjørt hondbóltskappingina meira undirhaldandi, enn hon leingi hevur verið**

ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Bert seks umfør eru nú eftir av ársins útgávu av Atlantic Airways-kappingini.

Tað einasta, sum enn stendur greitt, er, at Neistin verður annað liðið í finaluni, meðan tað hjá hinum fimm liðunum er háspenningur í luftini, hvørja ferð farið verður á vøllin.

Fremsta orsøkin til hetta er, at ein niðurflytari skal finnast, nú Team Klaksvík er í ferð við at vinna sær rætt til uppflyting, og tað hevur fingið fleiri av siðbundnu feløgunum at vena seg um, at tað rættasta vildi verið at víðkað bestu deildini til sjey lið, soleiðis at øll eiga umboð í fremstu røð.

Tað er væl skiljandi, at einki av teimum fimm liðunum, sum framvegis eru í niðurflytingarvanda ynskir at fara eina deild niður. Og serliga ikki, tá tað nú í nógv ár als ikki hevur verið upp á tal við niðurflyting. Men tað er væl ein veruleiki, sum er galdandi í øllum ítróttum, har kappast verður í deildum. Onkur má standa eftir við Svartaperi, tá kappingin er av. Tað er ein partur av spælinum, og tað er eisini við til at økja um spenningin, eins væl og stríðið um heiðursmerki er tað.

Og fyri alt tað, so kann ein niðurflyting eisini vera sunn, um hon verður brúkt rætt. Eitt nú at fremja ættarliðsskifti, ella eisini til at skapa nakrar succés-upplivingar, sum kunnu verða truplar at finna í ovaru deildini.

Sosialu grundgevingarnar fyri at broyta niðurflytingarspurningin halda snøgt sagt ikki, tá um ræðurm kappingarelementið. Og hetta elementið hevur sera stóran týdning, hóast sosial karmarnir so sanniliga eisini gera tað.

Men er ynskið at halda fast um kappingarandan, so latið niðurflytingina standa við.